

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 01 - 2012

# Skjótt verður trot á yvirmonnum

Um nøkur fá ár verður stórt trot á yvirmonnum til norsku frálandavinnuna, og tørvurin á maskinmonnum verður serliga stórur. Tað er dagligi leiðarin á Opplæringskontoret for maritime fag, Øyvind Bårdsen, sum rópar varskó. Hann vísir á, talið á nútímans frálandaskipum veksur, samstundis sum pallarnir á norskum øki gerast fleiri og fleiri, og at øll kappast um at fáa fatur á teimum, sum hava ta neyðugu útbúgvingina. Árliga eru millum 250 og 300 norðmenn byrjaðir sum yvirmanslærlingar tey seinastu árini. Málið hjá teimum er at gerast stýrimenn ella maskinmenn, men royndirnar vísa, at nógvir gevast, áðrenn teir eru lidnir. Samstundis vísa hagtøl, at á hvørjum ári tey næstu árini fara millum 300 og 350 yvirmenn upp um 60 ára aldur, og tí fara millum 50 og 100 yvirmenn at resta í á hvørjum ári. Útlendskir yvirmenn Øyvind Bårdsen vísir samstundis á, at tey seinnu árini er talið á norskum stýrimonnum og maskinmonnum minkað. Fyri fáum árum síðani vóru teir meiri enn 8.400, men í 2010 vart talið farið niður um 7.000. Hendan minkingin hevur verið, samstundis talið á nýggjum skipum og serliga skipum í frálandavinnuni er vaksið, og tað merkir, at nógvir útlendskir yvirmenn eru komnir í tann norska flotan. -Men samstundis vita vit, at við árslok í 2010 vóru næstan 1.100 yvirmenn við norskum skipum eldri enn 60 ár, og tá pensjónsaldurin hjá teimum er 60, kunnu teir fara frá, tá teir hava hug. Harafturat vóru næstan 1.800 yvirmenn millum 50 og 60 ára gamlir, so verða tað ikki fleiri, sum velja at útbúgva seg, verður stórt trot á yvirmonnum, sigur Øyvind Bårdsen við Stavanger Aftenblad.